# Tórshavnar Rotary Klubbi sendir »Shelterboxir« til Haiti

*Tíðindaskriv*







Tórshavnar Rotary klubbi avgjørdi herfyri at fara undir at stuðla einum tiltaki hjá Rotary International nevnt »Shelterboxes«.

Ein »shelterbox« er ein liðugtpakkað minibingja. Í henni er eitt sterkt og gott tjald, sum kann hýsa 10 fólkum. Í bingjuni er annars: vatntangi, tablettir at reinsa vatn við termoseingjaklæði, amboð, kókiútgerð, ein lítil komfýrur, sum kann sláast saman og brúka ymisk sløg av brennievni og mangt annað. Útgerðin verður lagað til alt eftir í hvørjum øki av heiminum útgerðin verður nýtt. Tey, sum »búgva« í tjaldinum, hava góðar møguleikar at lívbjarga sær í einar 6 mánaðir har. Ein slík bingja kostar á leið 5.000,- dkr.

Shelterboxir hava í fleiri førum víst sítt virði í verki. Rotary hevur klubbar í flest øllum londum í heiminum og er tí lætt at koma í samband við fólk á staðnum, og hjálpin kemur tí skjótt og bíliga fram.

Sum dømi kann nevnast, at tá melduródnin rakti Burma í mai 2008 noktaði hernaðarstýrið av politiskum ávum nógvum hjálparfelagsskapum at koma inn í landið, hóast eini 100.000 fólk høvdu latið lív, og enn fleiri vóru vorðin heimleys og høvdu tørv á hjálp. Rotary slapp inn í landið beinavegin við sínum smáu bingjum, tí Rotary hevur klubbar í Burma.

Í sambandi við jarðskjálvan á Haiti og teir ræðuligu avleiðingar hann hevur havt við sær hevur Rotary Danmark, sum hevur 280 klubbar í danska ríkinum, sett sær fyri at senda í minsta lagi 300 Shelterboxes til Haiti.

Tær fyrstu boksirnar komu fyri nøkrum døgum síðani til Port au Prince og koma fleiri boksir inn hvønn dag..

Mark Pearson úr Onglandi, sum hevur verið á Haiti síðan hósdagin í seinastu viku greiðir frá, at tað, sum tørvar mest beint nú, eru hospital, so fólk kunnu fáa viðgerð, og verða tí tey fyrstu teltini brúkt til hetta endamál.

Í dag - hósdag - var upphæddin hjá Rotary Danmark komin uppá kr. 1.4 mió. kr. og hevur Tórshavnar Rotary klubbi higartil savna saman 17.000,- dkr.

Meira kann lesast um hetta á **www.rotary.dk** og um onkur hevur hug at stiðja tiltakinum, kann tað gerast við at senda pening á **Konto 6460 166.702.7 merkt »shelterbox«**

**Súsanna Danielsen,**
**Forseti**
**Tórshavnar Rotary Klubbi**

# Útbygg heldur heimahjálpina

Ístaðin fyri at skerja, átti heimahjálpin at verið munandi útbygd, so okkara gomlu kunnu vera sum longst í egnum bústaði – hetta er tað tey ynskja, og hetta er ein bílig loysn

Heldur enn at skerja stuðul og hækka gjøldini til heimahjálpina, so átti landsstýrið heldur at miða ímóti at útbyggja heimahjálpina, so møguleiki verður hjá okkara gomlu at vera í egnum bústaði. Hetta átti at verið ein sjálvsagdur partur av eldrapolitikki landsins.

**Sambýlispláss**
Viðvíkjandi hækkingini av gjaldinum til eldrasambýli er at siga, at ein hækking á 2000 kr um mánaðin er alt ov stór. At prísirnir ikki eru hækkaðir í nøkur ár er ongin umbering fyri at hækkað gjaldið so nógv í einum.

Tað er ein sannroynd, at kostnaðurin á vørum og tænastum er hækkaður, tískil kann grundgevast fyri, at gjaldið skal hækkað nakað, men ikki so nógv sum skotið verður upp.

Havast skal í huga, at á sambýlum hevur búfólkið munandi meir útreiðslur enn t.d. á einum ellis- og røktarheimi, tí kann tað ikki vera eins dýrt at búgva á einum sambýli sum tað er á einum ellis- og røktarheimi.

Hækkingin skuldi í mesta lagi verið 200 kr um mánaðin, og síðani kundi verið ásett, at prísirnir vera javnaðir við 2% um árið ella kundi kostnaðurin fyri eitt sambýlispláss fylgt prísvøkstrinum.

Áðrenn nøkur hækking verður framd áttu land og kommur at samst um ein leist fyri sambýlini, og hvussu prísirnir skulu vera og hvussu eitt møguligt hægri gjald skal býtast millum land og kommunur.

**Inntøkumarkið**
Viðvíkjandi ætlanini at lækka inntøkumarkið áðrenn fólk rinda fyri heimahjálp, so mæla undirritaðu staðiliga frá at gera hesa broyting.

Tað er alt ov nógv, at lækkað inntøkumarkið fyri hjún úr 75.000 kr niður í 1500 kr og fyri støk úr 50.000 kr niður í 1000 kr áðrenn tú rindar fyri heimahjálp. Markið áðrenn fólkapensjónistar rinda fyri heimahjálp eigur at standa í stað, og møguliga vaksta við prístalinum.

Tað er í lagi, at javna gjaldið fyri heimahjálp við 3%, men mælt verður staðiliga ímóti, at hækkað gjaldið við heilum 15 kr um tíman.

**Gjaldið fyri heimahjálpin**
Um landsstýrið ger hesar broytingar kann tað hugsast, at fólk ið hava alneyðugan tørv á heimahjálp noyðast at skerja hetta og/ella hesar broytingar fara eisini at skunda undir, at fólk flyta skjótari úr egnum heimi, hóast hetta er ímóti teirra ynski.

Tað átti at verið partur av eldrapolitikki landsins, at stuðla fólki sum mest at búgva í egnum heimi, um ynski er um tess. Hetta var eisini eitt av aðalendamálinum við heimahjálpini, tá ið hon í síni tíð varð stovnað.

Undirritaðu taka undir við Landsfelag Pensjónista og mælir til, at tað almenna heldur enn at skerja eigur at styrkja munandi um heimahjálpina hjá teimum heimabúgvandi og ikki leggja enn størri gjøld fyri heimahjálpina.

**Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag**

**Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag**

**Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag**